Kommunufelagið

MENTAMÁLARÁÐIÐ
HOYVÍKSVEGUR 72
POSTBOX 3279
110 TÓRSHAVN

Dagfesting
4. mars 2015

Okkara j.nr.
15/00773-3

Málsviðgeri
Eyðun Christiansen

Tygara j.nr. 13/00631-27

**Viðv. Uppskot til løgtingslóg um skúladeplar (depilslógin)**

Mentamálaráðið hevur 19. februar 2015 sent Kommunufelagnum, Uppskot til løgtingslóg um skúladeplar (depilslógin), til hoyringar. Hoyringsfreistin er ásett at verða 04. mars 2015.

Kommunufelagið leggur seg ikki út í, hvussu Mentamálaráðið bygnaðarliga skipar miðnámsskúlaøkið, og tískil hevur Kommunufelagið heldur ikki nakrar ítøkiligar viðmerkingar til ætlanirnar hjá landsstýrinum um møguligar skúladeplar, men vit vilja tó nýta høvi til at koma við øðrum viðmerkingum.

Sambært viðmerkingunum til uppskotið, so hevur verið tætt samskifti millum Mentamálaráðið og leiðslurnar á miðnámsskúlunum í Tórshavn, Eysturoy og í Klaksvík, ímeðan miðnámsskúlin í eitt nú Suðuroynni als ikki verður nevndur í uppskotinum. Kommunufelagið gongur út frá, at møguligar ætlanir um broytingar verða viðgjørdar í neyvum samskifti við viðkomandi leiðslur í teimum einstøku økinum, og ikki eintýðugt verða avgjørdar av Mentamálaráðnum.

Kommunufelagið mælir eisini til at skipanin viðvíkjandi rakstrarstuðli til lærlingaundirvísing verður endurskoðað. Sambært uppskotinum so skulu eisini yrkisskúlar skipast undir einari depilsleiðslu og sum partar av komandi skúladeplum. Hinvegin so skulu kommunurnar eins og nú gjalda 20 % av raktstrarstuðlinum til lærlingaundirvísing og verður hetta býtt út á kommunurnar eftir heimstaðnum sum lærlingarnir høvdu tá teir byrjaðu skúlan.

Fyri tað fyrsta hevur hetta við sær, at flestu kommunur kunna hava útreiðslur av lærlingundirvísing langt eftir at næmingur er fluttur úr kommununi. Í øðrum lagi dugir Kommunufelagið ikki at síggja nakra sakliga grundgeving fyri at kommunurnar framhaldandi skulu halda hesar útreiðslur. Miðnámsskúlarnir eru undir ábyrgd Mentamálráðsins og Mentamálaráðið átti tískil eisini at havt fulla fíggjarliga ábygd av øllum tilboðum á miðnámsskúlaøkinum. Kommunufelagið vil tí heita á Mentamálaráðið um endurskoða hendan partin.

Kommunufelagið

Í § 9 stk. 2 pkt. 3 stendur annars, at Føroya Kommunufelag ger tilmæli um ein lim og ein varalim. Rætta heitið á felagnum er **Kommunufelagið** og ikki Føroya Kommunufelag.

Kommunufelagið hevur annar ikki aðrar viðmerkingar til uppskotið.

Vegna
Kommunufelagið

| | |
|---|---|
| Heðin Mortensen | Eyðun Christiansen |
| Formaður | Stjóri |

**R. C. Effersøesgøta 30 · Postboks · 53 FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · Fax +298 302481 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**